# Vit søkja KT-fólk

Farodane hevur sum aðalstevnumið at vera sjálvsagdi samstarvsfelagin og vit trúgva uppá, at tað er hesin setningur, ið hevur borið okkum fram til at gerast millum fremstu KT-veitarar í landinum. Í KT-deild okkara eru vit ein manning uppá góðar 25 starvsfelagar, deilt á sølu, tænastu, ráðgeving og menning. Av loysnum arbeiða vit fyrst og fremst innan Dell/EMC, Microsoft, Apple og Cisco tøkni, umframt at vit menna KT-loysnir í tøttum samstarvi við kundar okkara.

Farodane eru m.a. Dell, Microsoft, Canon og Apple góðkendir samstarvsfelagar. Stórur partur av virkseminum er projektorienterað og í toymum, bæði í deildini og uppá tvørs.

Sært tú teg sjálvan hava ein leiklut í menningini av hesum kjarnuøki hjá Farodane – annaðhvørt sum partur av sølu- ella tænastumanning okkara - frætta vit fegin frá tær.



**Til KT-søludeild okkara søkja vit fólk til sølu og kundarøkt**

Hevur tú royndir, kunnleika og viðkomandi útbúgvning innan eitt av niðanfyristandandi økjum, móttaka vit fegin tína umsókn:

**Virkisráðgeving / Key Account Management**
Styrkja og menna strategisk sambond við lyklakundar
Menning av nýggjum virkisøkjum og konceptum
Ráðgeving um KT-íløguætlanir saman við lyklakundum

**Virkis-applikatiónir o.o. serforrit**
Royndir við fíggjarstýringsskipanum – kunnleiki til bókhald ein fyritreyt
Innlit og royndir við journalskipanum, CRM o.ø. skjalastýringsloysnum
Kunnleika til heimasíðuskipanir o.a. webloysnir

**Print-, kopi- og framløguloysnir**
Royndir og kunnleika til kopi- og printloysnir
Ráðgeving innan skjalahandfaring og –stýring
Royndir og kunnleika til sjónvørpur, audio/video o.a. framløguloysnir

**Til KT-tænastudeild okkara søkja vit fólk til netrøkt-og ráðgeving**

Hevur tú royndir, kunnleika og viðkomandi útbúgvning innan eitt av niðanfyristandandi økjum, móttaka vit fegin tína umsókn:

**Netumsitari**
Royndir og vitan um IP-, VPN- og tráðleysa (802.11/16) nettøkni
Royndir innan Cisco tøkni
Royndir innan Linux er ein fyrimunur

**Microsoft Servera- og netumsitari (MCP/MCSA)**
Royndir og kunnleika innan umsiting av Microsoft Servara umhvørvi

**Apple grafikari / netumsitari**
Umsitan og viðlíkahald av Apple útbúnaði
Ráðgeving innan útbúnað til grafiska sniðgeving
Ráðgeving innan Adobe forrit o.a. multimedia tilhoyr
Royndir innan Windows & Linux/Unix er ein fyrimunur

*Omanfyri nevndu økir umfata eisini fylgjandi:*
Ráðgeving og planlegging av KT-infraskipan og loysnum til kundar okkara.
Leggja til rættis og íverkseta netverks-/serverauppstigingar.
Planlegging og íverksetan av álítandi trygdaravritsskipanum.
Planlegging og íverksetan av KT-trygdar skipanum (firewalls/antivirus).

**Vit vænta at tú:**
hevur viðkomandi royndir og útbúgving/certifiseringar innan KT
ert fyrikomandi og dugir væl at samskifta við viðskiftafólk
hevur áræði, ert álítandi og ábyrgdarfullur

**Vit kunnu bjóða tær:**
eitt-avbjóðandi starv við fjølbroyttum arbeiðsøkjum
persónliga menningarætlan, ið gevur møguleika fyri støðuga menning á viðkomandi økjum
eitt-gott arbeiðsumhvørvi í eini sunnari fyritøku í menning
50 góðar starvsfelagar

Sært tú hetta sum eina avbjóðing, vilja vit fegin hoyra frá tær innan **6. februar 2006**. Starvsbyrjan og lønarviðuskifti verða avtalað í samráð við leiðsluna.

Skrivlig umsókn saman við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til:

Farodane P/F
Starvsfólkadeildin
Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn

FARODANE 01/06

*Farodane er 55 ára gamalt handils- og tænastuvirkið, sum í dag er fremsti heildarveitari til skrivstovuna.*
*Virksemið fevnir um sølu og tænastuveitingar innan KT-loysnir, skrivstovuinnbúgv og annan skrivstovubúnað.*
*Farodane rekur eisini skrivstovumarknaðin Farodane City, møblasøluna Farodane Casa, umframt skeiðstovuna Kvasir.*

FARODANE
Brekkutún 4 - FO-100 Tórshavn - Tlf: 311414 - Fax: 317534
farodane@farodane.fo - www.farodane.fo



# Løgfrøðingur ella annar hóskandi akademiskur førleiki til skrivstovuna hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini

Høvuðsbarnaverndarnevndin

Nevndin tekur avgerðir sambært barnaverndarlógini um m.a.:

- Umsorganaryvirtøku í málum, har samtykki ikki er fingið frá foreldrunum.
- Samverurætt foreldranna í sambandi við umsorganaryvirtøku og skipan av hesi.
- Rætt til ókeypis umboðan í málum um umsorganaryvirtøku og samverurætt, og um familjuviðgerð o.a fyribyrgjandi fyriskipanir og skal m.a. góðkenna avgerðir hjá barnaverndarnevndum.
- Familjuviðgerð á stovni hjá landinum og tilboði um serdagstovn til børn, sum ikki kunnu integrerast í vanligan dagstovn.
- Kanning og viðgerð av einum barni, ið er sett í verk uttan samtykki foreldranna.
- Forboð ímóti flyting heimaftur av einum barni, sum er sett heiman við samtykki foreldranna.

Vit sóknast eftir einum fólki, ið hevur løgfrøðiliga ella aðra viðkomandi universitetsútbúgving til skrivstovuna hjá Høvuðsbarnaverndini. Tað er ein fyrimunur at hava starvsroyndir innan fyrisiting á almannaøkinum, men eingin treyt.

Viðkomandi fær til uppgávu at fyrireika mál og skal tryggja, at málini eru væl lýst, áðrenn tey verða løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina. Harumframt fær viðkomandi ábyrgdina av at leggja til rættis arbeiðið á skrivstovuni.

Viðkomandi verður partur av einum stovni, sum alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er, at viðkomandi er virkin og nærlagdur, hevur góð samstarvsevni, dugir at leggja til rættis og arbeiða sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar, og annars arbeiða í samsvari við endamál og málsetningar stovnins.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 35 35 10 ella 21 54 80.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 20. februar 2006, kl. 12.

Send umsóknina til
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

KREA.FO - TEL 47 80 80

almannastovan
www.almannastovan.fo